# TILTØK

**Páskastevnan í Ítróttarhøllini á Hálsi**
Skírisdag kl. 19.00: Møti.
Langafríggjadag: kl. 10.00: Morgunmøti, kl. 15.00 og kl. 19.00: Møti.
Leygardagin: kl. 19.00: Møti, kl. 22.00: Longsangskvøld.
Páskadag: kl. 10.00: Morgunmøti, kl. 15.00: Familjumøti, kl. 19.00: Møti og kl. 22.00: Gospeltiltak.
2. páskadag: kl. 10.00: Morgunmøti, og kl. 18.00: Møti.
Luttøka við Gordon Hickson úr Onglandi og Ole Henry Halleraker úr Norra. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Páskadag: kl. 8.00: Páskafrøi, kl. 9.00: Páskatónar á Landssjúkrahúsinum, kl. 11.00: Møti og kl. 18.00: Møti.
2. páskadag kl. 18.00: Møti. Vit hava vitjan av majorunum Kari og Alf Tollisen.

**Katólska kirkjan**
Skírhósdag kl. 17 Messa, kl. 19-24 Tilbiðjan í Kerit.
Langafríggjadag kl. 11 Krossvegur, kl. 15 Pínslusøga Harrans. *1)*
Páskaaftan kl. 22 Páskavøka
Páskadag kl. 11 Hámessa, eingin sunnudagsskúli.
2. Páskadag kl. 11 Messa.
*1) Talvan gongur til frama fyri Heilaga Landið*

**Ebenezer**
Skírisdag kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Langafríggjadag kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Páskadag: kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 12.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangeliskt møti.
2. páskadag kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bardagin mikliið komin at enda. Kl. 11.00: Gudstænasta (sjónvarpsupptøka), J.V. Danielsen.

**Meinigheitshúsið**
Langafríggjadag kl. 18.00: Møti v/ Axel Jacobsen.
Páskadag kl. 18.00: Møti við Bergur Debes Joensen.
2. páskadag kl. 18.00: Møti v/ Niels Juul Olsen, Gittit syngur.
Týskvøldið 2. apríl kl. 20.00: Bíbliutími, Lukas kap. 6, vers 1-19.

**Meinigheitin í Hoyvík á Brekku 3**
Páskastevnan verður í Høllini á Nabb við Gordon Hickson úr Onglandi og Ole Henry Halleråker úr Norra.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19.00: Delli, kl. 21.00: Bøn fyri býnum.
Hóskvøldið kl. 19.00: Teen Xtreme.
Páskadag kl. 11.00: Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Møti í kvøld kl. 20.00: Møti.

**Rhema á Hálsi**
Ongi møti verða á páskum vegna Páskastevnuna í Havn.

**Thabor, Fuglafjørður**
Páskastevnan byrjar við altargangsgudstænastu skíriskvøld kl. 18.00. Uni Næs prædikar.
Langafríggjadag kl. 18.00 talar Torleif Johannesen og Taborkórið av Toftum syngur.
Leygardagin 30. mars kl. 20.00 talar Pól Johannesen og Effata av Strondum syngur.
Klokkan 23 er ungdómsløta v/ kafé.
Páskadag er møti kl. 18.00, har Alfred Olsen talar, og kl. 21.00 er ungdómsmøti, har Hans Kristian Johannesen talar.
2. páskadag kl. 18.00 talar Johs. Martin Olsen, Rituvíkskórið syngur. Aftaná verður eftirmøti.

**Lívsins Orð**
Møti verður páskamorgun kl. 10.30. Øll eru vælkomin. Tim 5 og Liljurnar eru í páskafrí.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Skírisdag verður møti kl. 18.00 við Andrias Andreasen og páskadag kl. 18 møti við Egil S. Olsen. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20.00: Bibliutími.
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Bússurnar verða tømdar. Allar kvinnur eru vælkomnar. Hetta verður síðsta kvøldið.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20.00: Eingin fundur.
Skírisdag kl. 18.00: Evangeliskur fundur. Talari: Øssur Berghamar.
Langafríggjadag kl. 18.00: Evangeliskur fundur
Páskadag kl. 11.00: Breyðbróting
Eingir fundirnir 1. og 2. páskadag kl. 18.00 vegna samfelagsfundir í Hvalba.
Ónsdagin kl. 20.00: Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hesi møti verða í Framtíðini í Vági á páskum:
Mikudagin 27. mars kl. 19.00.
Skírisdag kl. 11.00 og kl. 19.00.
Langafríggjadag: møti kl. 11.00 og kl. 19.00, bíbliutími kl. 16.00.
Barnamøti hvønn dag.
Vitjan úr Havn og Noreg.
Eingrím Holm og onnu rhava møti 1. og 2. páskadag kl. 18.00.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.
Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 319630/61655400.*

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Um áhugi er, verður skipað fyri túri til Skotlands 9.-13. mai. Tilmelding á tlf. 316491.
*Mikudagin 27. mars:*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
*Hósdagin 28. mars:*
**Skírhósdagur – stongt.**
*Fríggjadagin 29. mars:*
**Langifríggjadagur – stongt.**
**Tilhaldið verður afturlatið til og við 1. apríl. Vit ynskja øllum einar gleðiligar páskir.**

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn**
2. páskadag kl. 10.30 verður gongutúrur úr á Konufelli. Farið verður av Kunningarstovuni. Havið heit og góð gonguklæði og drekkamunn við. Tilmelding.
2. páskadag kl. 15.00 fara vit at rulla páskaegg í Kúrdali. Farið verður frá Skógrøkt Landsins.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
**Tín** stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Sporafundur í kvøld kl. 20.00 –21.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin: mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 – fyri børnum uttan ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
*(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)*
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
*Tlf. 315816*
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Alzheimerfelagið**
*Tórsbyrgi 16*
*100 Tórshavn*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Køliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið,*
*Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10C*
*tlf./fax 321520*
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 6. juli giftast í Figueira da Foz í Portugal, Hansina Dahl og Robert McBirnie (yngri).

Tit, ið hava hug at halda summarferiu í Portugal - sól, summar, strond, fitt fólk, bílig matstøð o.s.v. - og samstundis hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá innan 1. mai. Vit hjálpa til við bíligum bólkaprísum.

Nærri upplýsingar fáast á www.brudleyp.com ella á tel 314919.



## FILMSTEIGURIN

# E.T.

Hann er bangin. Hann er púra einsamallur. Hann er 3.000.000 ljósá heiman. – Hann er komin aftur!

Fyri tjúgu árum síðani fullu allir heimsins biografgangarar fyri »E.T.« hjá Steven Spielberg – søgan um eina lítla rúmdarveru, sum strandaði á jørðini og gerst vinur við tann upp á mangar mátar einsamalla dreingin, Elliot. Hann roynir í øllum førum at skilja hjúnarskilnaðin hjá foreldrunum.

Elliot og tann fremmandi – E. T., sum merkir Extra-Terrestrial, »uttan fyri jørðina« – knýta tøtt bond, sum broyta tilveruna hjá Elliot fullkomiliga, ja, tilveran hjá allari familjuni broytist. Skjótt fær Elliot eisini sytur og bróður sín við í loyndarmálið.

Hann hevur eisini brúk fyri samsintum. tí meðan E. T. roynir at koma í samband við rúmdarskipið hjá sær, eru agentarnir hjá stjórnini í ferð við at spora hendan gestin á jørð okkara. Og teir taka ikki júst ímóti honum við opnum barnasinni…

Jubileumsútgávan av E. T. hevur fingið nakrar senur afturat og við hjálp av talgildari (digitalari) tøkni hava teir eisini rættað upp á nakrar effektir, sum ikki vóru gjørligar fyri 20 árum síðani. Men í botn og grund er søgan hin sama sum hinaferð, og Henry Thomas er framvegis bara tíggju ár, og Drew Barrymore seks. Og E. T. er E. T.




Frumsýning
Mikudagin 27. mars kl. 18⁰⁰ Mikudagin 27. mars kl. 20¹⁵
Hósdagin 28. mars kl. 18⁰⁰ Hósdagin 28. mars kl. 20¹⁵

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 311956**

**2 VINDER AF OSCAR**

Mikudagin 27. mars kl. 22⁴⁵ Hósdagin 28. mars kl. 22⁴⁵




Mikudagin 27. mars kl. 20³⁰ Mikudagin 27. mars kl. 23⁰⁰
Hósdagin 28. mars kl. 20³⁰ Hósdagin 28. mars kl. 23⁰⁰

Mikudagin 27. mars kl. 16⁰⁰ Mikudagin 27. mars kl. 18¹⁵
Hósdagin 28. mars kl. 16⁰⁰ Hósdagin 28. mars kl. 18¹⁵

Billettprísur: 45,- kr.
Mikudagin 27. mars kl. 16¹⁵ Hósdagin 28. mars kl. 16¹⁵